## Størri ójavni nú

Nógv teir flestu íslendingarnir halda, at ójavnin í íslendska samfelagnum er vaksin tey seinastu fýra árini. Ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Ríkisútvarpið og Morgunblaðið, vísir, at heili 71 prosent eru av teirri áskoðan. 18,2 prosent halda, at einki er broytt í so máta tey seinastu fýra árini, og 10,7 prosent halda, at ójavnin er minkaður. Heldur fleiri kvinnur enn menn halda, at ójavnin í íslendska samfelagnum er vaksin.

## Krevja annan formann

Seks kommunur í Grønlandi krevja, at kommunufelagið KANUKOKA fær nýggjan formann ístaðin fyri Lars Karl Jensen. Tær seks kommunurnar eru Nanortalik, Qaqortoq, Narsaq, Maniitsoq, Sisimiut og Qasigiannguit. Sambært viðtøkunum hjá felagnum kunnu seks kommunur krevja eykaumboðsfund í felagnum, og tær hava nú kravt fund innan regluliga ársfundin 22. mai. Lars Karl Jensen sigur, at hann ætlar sær ikki frá.

# upplestur



*Frá upplestrinum í Leikalund í gjár, sum Vencil saman við Leikalund skipaði fyri. Frá vinstru Alexandur Kristiansen, Heðin M. Klein, Carl Jóhan Jensen og Hanus Kamban*

Arnbjørn Dalsgarð læs søgur eftir sveitsiska høvundan Peter Bichel, ið Hugin Eide hevur týtt. Eg havi sæð hesar søgurnar fyrr, og eg skili illa, hví Vencil hevur tikið hetta við og ikki minni, hví teir hava sett hesar søgurnar fremst?

### Alexandur og Carl Jóhan

Alexandur Kristiansen er altíð framúr góður upplesari. Hann læs millum annað eina yrking kallað »Synd er í«, ið var sera góð. Eisini læs hann eina yrking, ið var ein heilsan til Matras. Síðani kom ein, ið kallast »Fátækur kapitalistur«, hon er ikki góð. Eina um sonin, sum spyr hví hann skal læra evnafrøði og støddfrøði, ið heldur ikki er nakað serligt.

Ofta hevur ein yrking eftir Alexandur heldur einkisigandi titlar, men tó eru yrkingarnar góðar, almenniskjaligar og fínar. Yrkingin, sum stendur í Vencil eftir Alexandur, »Í hesi løtu«, er á sera høgum støði.

Sum stóra rosinan í pylsuendanum kom Carl Jóhan Jensen. Hann læs ein prosatekst, sum eitur »Hvørki«, ið eg ofta havi hoyrt fyrr um føroyskt skaldskapartilvit og mangul á sama. Hesin heldur knortluti tekstur um tjóðskap, samleika og føroyska list og skaldskap inniheldur í brotum mangt og hvat, sum er forvitnisligt, men torført er at síggja, hvat hesin maðurin vil við tekstinum. Má ein dag seta meg at nærlesa og royna at skilja hann betur.

Carl Jóhan nertir við alt frá Kant, Hegel til Platon og skapar sum ein annar (sein) heideggerianari duldar og huldar týdningar við nýggjum orðum og orðasamansetingum sum »ó-í-sær-ligan í–sær-leika«. Tað er, sum hesin prosastubbin snýr seg um hetta at vera skrivandi føroyingur, um føroyskt ella ikki. Um tjóðir og føroyskt skaldskapartilvit, men sum so ofta við Carl Jóhan, so nertir hann eina mest bert við hesi stóru evni og telgir sær heldur ljóðmyndir, enn at vera klárur og einkul.

Tiltakið var ikki nakað stórt brak, heldur ikki var tað vánaligt. Av teimum 21 høvundunum, har 12 eru føroyingar í Vencil hesuferð, vóru kanska ov fáir við. Mest vóru tað høvundar, ið vit hava sæð og lisið fyrr, og tá teir so fyri tað mesta lósu úr einum blaði, ið vit longu kenna, so var heldur smátt við nýggjum tekstum at hoyra. Eg saknaði tí tey yngru, sum eisini eru við í Vencil og kvinnurnar.